## Bjarga vikuskiftinum við tí allar kulastu fløguni beint nú!




23 ára gamla norska sangarinnan Maria Mena hevur bergtikið allan europeiska tónleikaheimin við fløguni Cause and Effect, sum kom út í vetur.
Hása, stillføra og kortini kraftmikla røddin biður um at verða spæld 'forfrá' í fløguspælaranum ein friggjadag seinnapart, meðan tú dansar runt í stovuni við einum kustaskafti. So er vikuskiftið bjargað!

Ævisøgan um Michelle Obama eftir Liza Mundy frá Washington Post, man vera hin best umtókta í røðini av bókum um amerikonsku fyrstudamuna higartil. Bókin hevur fingið framúr góð ummæli, bæði 'over there' og hesumegin Atlantshavið. Fæst í bókabúðunum fyri 229,- krónur.




## Lekkur hóast kreppu



Nú kreppan kráar, lata dýru klædnahandlarnir aftur, ein fyri og annar eftir. Samstundis uppliva bíligaru merkini, sum til dømis Saint Tropez, stóra framgongd. Sant Tropez fæst millum annað í Klivanum, har alt fleiri kundar velja merkini, sum ikki kosta so nógv.

## Sum at vera í rotuskóm…



Danskt snið og italskt handverk. So verður skógvurin ikki betri. Gidigio skógvurin frá Klivanum kostar 1789 krónur. Men so fert tú heldur ikki úr honum aftur.



Góður stílur snýr seg um at blanda tað klassiska við aktuella mótanum. Og ikki minst at finna tað, sum klæðir tær!